Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Hervør Pálsdóttir, løgtingsmaður

Svarari: Bárður á Steig Nielsen, løgmaður

Evni: Navnalógin og formlig boð til fólkakirkjuna

Spurningar:

1. Metir løgmaður tað verða virðiligt, at landsstýrismaðurin í mentamálum drálar við at geva fólkakirkjuni formlig boð um, at prestar skulu kunna skráseta børn hjá sammøðrum, soleiðis sum tulkingin hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum staðfestir?
2. Ætlar løgmaður, sum hevur eftirlit við landsstýrisfólkunum, at fara inn í málið, soleiðis at børn hjá sammøðrum kunnu skrásetast, soleiðis sum tulkingin hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum staðfestir?

Viðmerkingar:
15. august 2022 svaraði Magnus Rasmussen, landsstýrismaður í umhvørvis- og vinnumálum undirritaðu, at tað var ikki neyðugt at broyta navnalógina, fyri at sammøður skuldu kunna geva eftirnavn til barn sítt. Í svarinum varð gjørt greitt, at tað er Umhvørvis- og vinnumálaráðið, ið hevur tulkingarrættin. (52-002/2022)

7. september 2022 svaraði løgmaður undirritaðu, at hann tók sum givið, at landsstýrismaðurin í mentamálum fylgdi tulkingini hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum. (52-022/2022)

Nú er meira enn ein mánaður liðin, síðan tað gjørdist greitt, hvussu lógin skal tulkast, og enn hevur fólkakirkjan ikki fingið formlig boð frá landsstýrismanninum í mentamálum um, at prestar kunnu skráseta børn hjá sammøðrum, soleiðis sum tulkingin hjá Umhvørvis- og vinnumálráðnum staðfestir.

Hesin fyrispurningurin verður settur fyri at fylgja upp uppá svarið, ið løgmaður gav undirritaðu 7. september 2022.

Á Løgtingi, 22. september 2022

Hervør Pálsdóttir